# rstu vikuna

sagt, at eftir røttum átti lítla familjan ikki at verið á lívi. Oftast letur onkur lív, um ongin ávaringarskipan er, tá eldur kemur í um náttina, meðan húsfólkið svevur. Vanliga lukta fólk ikki roykin og vakna, men sovna burtur av koltvíiltunni, sum verður upptikin í blóðinum 200 ferðir skjótari enn vanlig ilt. Men roykvarnarar varnast eldin, longu tá hann kyknar, og kunnu soleiðis varskógva húsfólkunum.

- Eg veit ikki, hví vit ikki hava hugsað um at fáa roykvarnarar settar upp. Tað er so nógv annað at hugsa um, tá men flytur, sigur Eyðdis. Hon fortelur, at aðrastaðni tey hava búð, hevur alt verið í lagi.

– Vit høvdu eitt Falckhald, tá vit búðu niðri. Har fingu vit roykvarnarar, teppi, tog og eldsløkkjarar. Tað var altíð undir kontroll. So hetta er fyrstu ferð vit sjálvi skulu hugsa um hendan partin viðvíkjandi tí at seta búgv, sigur hon. Og Marner skoytir uppí, at tryggingarfeløgini áttu at útflýggja roykvarnarar til nýggjar kundar.

- Tað hevði heilt sikkurt loyst seg fíggjarliga, tí tað er sera kostnaðarmikið at skula lata endurgjald fyri eini hús sum okkara, sigur hann.

## Onkur ávaraði

Vit kenna tað, sum at onkur hevur hildið hondina yvir okkum og ávarað okkum, so vit náddu út. Tað vóru so nógv ting, sum kundu verið øðrvísi, men sum til alla Guds lukku kortini vildu væl til. Eitt nú var Tór farin úr sínum kamari, tá eldurin kyknaði har, helst av einari lampu, sum stóð í vindeyganum. Lítli Heri, sum svav í rimasongini í sínum kamarið, lá tíbetur tætt við gólvið, so hóast kamarið fyltist við royki, kom hann ikki niður til hansara. Hetta bjargaði honum nøkur dýrabar sekund, har Marner kundi finna hann og bera hann út í tún.

Harumframt hevði Marner eisini, til alla lukku, lagt seg út í sofuna, har hann vaknaði av roykinum. Kanska tí hann ikki var sovnaður so fast aftur.

Marner greiðir frá, hvussu tað var at fara inn í kamarið eftir lítla í øllum hitanum, myrkrinum og roykinum.

– Eg visti, at hann átti at liggja í rimasongini, men av tí at eg onki sá, føldi eg meg fram. Og eg minnist enn skelkin, tá eg ikki fann hann beinanvegin, tí hann hevði kropið seg saman uppi í høvdalagnum meðan hann svav. So tá eg fekk fatur í fótinum á honum, hálaði eg bara til og leyp á dyr við honum, meðan hitin frá logunum brendu í rygginum, sigur Marner.

## Takka øllum

*Men hvat ger ein ung familja, tá hon missir alt, sum hon eigur yvir eina nátt?*

– Vit eru fullkomiliga tikin av bóli av allari hjálpini, vit hava fingið. Bæði frá vinum, familju, kenningum og frá fólki, sum vit als ikki kenna, siga tey bæði Marner og Eyðdis, sum tíbetur høvdu øll tryggingarviðurskiftini í lagi og nú búgva inni hjá familjuni hjá Marner aftur.

– Tá man sum je ikki kenni øll fólkini í bygdini enn, so kennist tað so løgið ikki at vita, hvønn eg skal takka, tá eg møti fólki á gøtuni ella í handlunum. Tí fara vit hervið at nýta høvi til at takka hjartaliga fyri alla hjálpina, vit hava fingið, sigur Eyðdis.

Og eftir at vera spurd greiðir hon frá, at longu um náttina komu fólk við teirra við klæðum, og longu morgunin eftir kundi hon pakka taskur til dreingirnar við stivlum, útiklæðum og skiftiklæðum.

– Vit hava fingið steintoy, leikur til børnini, góð og fín klæði, lekrar heimabundnar troyggjur, pengar, gávukort frá handlum, eina stóra kurv við kropsrøkt til alla familjuna, hárproduktir, bensin... og eg kundi hildið áfram, sigur Eyðdis. Og Marner tekur tráðin upp:

– Vit vóru allir til frisør í gjár. Men hann vildi ikki taka ímóti pengunum, og bað okkum brúka teir til okkurt betur, sigur Marner, og smílist eymliga til Eyðdis.

Jú, ongin ivi er um, at tey eru rørd av allari hjálpini og stuðlinum.

## Fáa myndir aftur

Eitt sum mangan verður ført fram í sambandi við eldsbruna, er, hvussu ringt tað er at missa allar myndirnar av børnunum. Til hetta sigur Eyðdis:

– Tað vísir seg, at tryggingin kann gera nokkso nógv fyri at bjarga myndum í dag, og allar eru ikki brendar heilt burtur, men kanska bara í kantinum. Og so liva vit eisini í einari tíð, har fólk taka nógvar myndir. Onkur vinkona hjá mær eigur næstan líka nógvar myndir av okkara børnum, sum vit sjálvi áttu. So nú er bara at savna myndir frá øllum sum eiga myndir, vinfólki, familju og stovnum.

## Lítla samfelagið

Marner tekur yvir og sigur, at kanska er hetta júst tað, sum er fyrimunurin við at búgva í einum lítlum samfelagi sum Føroyum.

– Millum annað kom lokali Eik-stjórin niðan við einari heilsu sama fyrrapart, sum eldur hevði verið í. Tá hevði hann longu kannað øll pappír og at allir formalitetir við tryggingini vóru í lagi. So hann vissaði okkum um, at alt fór at laga seg, sigur Marner. Og bæði tvey leggja dent á, hvussu væl tey hava verið viðfarin av tryggingini.

– Tað hevur als ikki verið sum í hesum skrekkssøgunum man hoyrir, at tá á stendur, ger tryggingin alt fyri at snúgva sær undan. Nei, tey hava verið ómetaliga beinasom og kvik við øllum, sigur Eyðdis. Húsini verða nú tikin niður og bygt uppaftur av nýggjum.

– Vónandi kunnu vit flyta inn aftur til jóla. Og tá skulu húsini vera topp-tryggjað við øllum, sum skal til, fyri at vit kunnu sova trygt, sigur Marnar.



*– Vit kenna tað, sum at onkur hevur hildið hondina yvir okkum, so vit náddu út, siga Eyðdis og Marner. Tey vóna at flyta inn í húsini aftur til jóla, og tá verða roykvarnarar hongdir upp, áðrenn tey flyta inn*


# Lærarastørv í Sankta Frans skúla

**Lýst leys til setanar frá 1. august 2007**

**Søkt verður eftir 8 lærarum**
- trimum lærarum í fast starv, sum eru fulltíðarstørv
- trimum lærarum í tíðaravmarkað starv ská. 2007/08. Størvini eru fulltíðarstørv
- einum lærara í parttíðarstarv, sum er tíðaravmarkað ská. 2007/08 og
- einum lærara fyri lærara, ið hevur barnsburðarfarloyvi.

Tíðaravmarkaðu størvini og parttíðarstarvið eru fyri lærarar, ið hava farloyvi, lækkað tímatal, tímar vegna serligan tørv og at lesa avlopstímar.

**Søkt verður eftir lærarum, sum:**
- undir ábyrgd leiðslunnar og í samstarvi við lærarar skúlans skulu undirvísa og taka lut í dagliga arbeiði skúlans
- duga at samstarva og eru fyrikomandi
- eru fúsir at taka á seg tær uppgávur, ið eru í skúlanum
- eru við til áhaldandi at menna skúlan

**Harafturat skulu lærararnir hava førleika at átaka sær eina ella fleiri av hesum uppgávum:**
- flokslæraraarbeiði
- undirvísa í gentuítrótti/svimjing
- undirvísa í føroyskum, enskum, donskum og rokning
- undirvísa í tónleiki
- undirvísa í handaligu lærugreinunum

**Førleikakrøv:**
Læraraútbúgving og linjulestur ella samsvarandi førleika í nevndu lærugreinum/lærugreinaøkjum. Ynskiligt er, at umsøkjarar hava starvsroyndir í fólkaskúlanum, men læraralesandi, ið lúka prógv í summar, kunnu eisini søkja størvini.

**Lønar- og setanartreytir:**
Størvini verða lønt í lønarflokkunum 18.1 – 27.4 sambært avtalu millum Fíggjarmálaráðið og Føroya Lærarafelag og verða sett sum sáttmálasett størv. Tó kunnu tey, ið verða sett í fast starv, verða sett sum tænastumenn, um tey frammanundan eru í tænastumannastarvi.

**Umsóknir:**
Umsóknir við avriti av prógvi, CV og møguligum viðmælum skulu verða skúlastjóranum í hendi í seinasta lagi leygardagin 9. juni 2007 kl. 12.00.

Nærri fæst at vita um størvini hjá Selmar Jacobsen, skúlastjóra, á telefon 302532/220716 ella hjá Jákup Lindberg, varaskúlastjóra, á tlf. 302533/513074.

Í Sankta Frans skúla eru 330 næmingar í forskúla til 7. flokk. Í skúlanum starvast 30 lærarar. Skúlin hevur ein lærarahóp, ið fakliga røkkur víða og arbeitt verður alsamt við at menna skúlan

# Íbúð ella hús

Trúgvandi maður søknast eftir íbúð ella lítlum húsum í Vestmanna.

Vinarliga ringið á tlf. 21 29 69